

Mynd: Sunva Ey. Lassen

*Jutta Hansen seymaði manni sínum, Finni Hansen, føroysk klæðir, tá hann fylti 75 ár*

# Tað skal vera stílur í

**- Eg havi ikki tal á, hvussu nógv føroysk klæði eg havi gjørt, sigur 75 ára gamla Jutta Hansen, sum hevur avgjørdar meiningar um, nær føroyski búnin situr væl og ikki**

FØROYSK KLÆÐIR

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

– Eg elski handarbeiði. Tað er so stuttligt og hugnaligt at sleppa at gera vøkur ting. Mær dámar at vera í gongd, sigur Jutta Hansen, meðan hon skeinkir te, og 78 ára gamli maður hennara, Finnur Hansen, ruddar eitt sindur upp.

Jutta og Finnur Hansen húsast í hugnaligum húsum, sum hava ein lit, sum vísir, at her er ikki talan um keðilig fólk. Jutta hevur seymað, broderað og bundið til føroysk klæði, líka síðani døturnar komu og bóðu hana seyma teimum føroyskan búna.

Manninum seymaði hon ein føroyskan búna, tá hann fylti 75, og hon hevur eisini seymað til nógv av ommubørnunum.

– Vit eiga 14 ommubørn, og tað hevur alt meira ella minni gingið gjøgnum hondina hjá mær, sigur Jutta flennandi.

Føroyski búnin er ofta knýttur at søgum og siðum. Fastar reglur eru, hvussu alt skal síggja út, og allir partar av búnanum hava teirra serstaka heiti. Men nógv velja eisini at bróta eitt sindur frá og velja øðrvísi litir og annað. Jutta hevur onki ímóti, at fólk velja okkurt øðrvísi. Øll ommubørnini hava havt síni serligu ynski, men hugflogið skal vera útint við skili.

– Eg sá eina kvinnu við reyðum hári, reyðum turriklæði og reyðum fyriklæði. Tað var ikki serliga pent. Tað má vera stílur í. Og serliga menn mugu duga at lata seg betur í.

Sonur Juttu, Sofus Hansen, hevur ongantíð ynskt sær búna. Men einaferð ynskti hann sær vest.

– Hann er so fittur í hondunum og veit, hvat hann vil, so hann teknaði vestin sjálvur, og so seymaði eg hann. Hann brúkti hann saman við vanligum klæðum. Tað hevði eg ongantíð sæð fyrr. Men knappliga varð tað hægsti móti, og so tímdi Sofus ikki at brúka hann meir. Tað var onki stuttligt, tá øll onnur eisini gjørdi tað, sigur Jutta við einum skeivum smíli.

– Tað, sum upprunaliga setti ferð á seymingina, var ein kona, sum kom og spurdi, um eg kundi hjálpa henni við at seyma ein vest. Eg hevði bara gjørt kvinnubúnar og visti onki um vestar. Eg lænti eitt mynstur, men helt tað ikki vera nóg gott. Eg og dóttirin gjørdu so eitt betri mynstur, vesturin sat perfekt, og síðani vant tað bara upp á seg við at seyma fyri fólk.

Troyggjumynstrið, sum Jutta brúkar, er úr Nólsoy, og tað hevur serligar dygdir, sigur hon. Silkikanturin er ikki seymaður fastur aftanfyri, tí har slitnar hann so illa. Í staðin er ein troklitráður seymaður runt kragan, sum fær hann at sita betur.

Jutta fortelur um eina konu, sum kom við sjógv á baki aftur við einari slíkari troyggju.

– Hon var rásandi og segði, at troyggjan var ikki liðugt seymað. So bað eg hana lata sonin í troyggjuna. Hon sat perfekt, og alt var, sum tað skuldi.

**Góð ráð til ólavsøkuna**

– Eg havi ongantíð tímað at gingið í býnum á ólavsøku. Øll kenna Finn og ynskja at práta við hann, og so standi eg bara har og gløði, sigur Jutta.

Finnur Hansen, sum gjørdist fólkaogn við kenda sanginum, Undurfulla Land, hevur annars føðingardag á ólavsøku, og Juttu dámar væl at hava gestir og at stákast, men í ár væntar hon ikki, at tey fara at gera so nógv burtur úr.

Hóast hon ikki sjálv fer á ólavsøku, hevur seymikonan í Hoyvík nøkur góð ráð til tey, sum eiga føroyskan búna ella ætla at fáa sær ein.

– Nøkur mannfólkaklæði hava so keðiligt snið, at bæði ermar og herðar eru full av rukkum. Føroysk klæði skulu ikki hava puffermar, og vesturin má ikki vera ov stuttur. - Hjá kvinnunum skal erman vera so long, at hon kemur næstan niður til albogan, og turriklæðið skal leggjast so, at erman kemur undan, og mallurnar á troyggjuni skulu sita tættari um miðjuna enn um bringuna, sigur blíða seymikonan at enda.